Kommunufelagið

Uttanríkis- og vinnumálaráðið
Klik her for at angive tekst.

Dagfesting
31. august 2018

Okkara j.nr.
18/02739 & 2934

Málsviðgeri
Jóhan Lamhauge

Tygara j.nr.

**Viðv. Sigling við vatnskútara og regulering av sigling við ferðamannaskipum**

**Fra:** Jóhan Lamhauge
**Sendt:** 31. august 2018 15:48
**Til:** 'Anna Borg Dahl' <AnnaBorgD@uvmr.fo>
**Cc:** Gunnvá á Lofti <gunnval@fma.fo>; Pól Edvard Egholm <pole@uvmr.fo>
**Emne:** Kunngerðir til hoyringar

Takk fyri longdu hoyringarfreistina.

Uppskotini til kunngerð um sigling við vatnskutara og kravi um føraraprógvi til vatnskutara, saman við uppskotinum um reglulering av sigling við ferðamannaskipum, ið sjóseta smærri bátar við ferðafólkum, hava verið til viðgerðar í Havnanetverkinum hjá Kommunufelagnum og fyri í Stýrinum fyri Kommunufelagið.

Til tey bæði fyrst nevndu uppskotini var onki at viðmerkja.

Til kunngerðina um sigling við smærri bátum frá ferðamannaskipum skal KF viðmerkja, at kommunurnar sum havnamyndugleikar kundu hugsað sær at fingið útgreinað, hvørjir trupulleikarnir hava verið, sum roynt verður at loysa við hesi regulering. Harumframt skal viðmerkjast, at havnamyndugleikarnir kundu hugsað sær at tað í kunngerðini – eins og vanligt er í lóggávu – at undantøk kunnu gerast til kravið um flutning umvegis ISPS-góðkenda havn, soleiðis at havnamyndugleikarnir kundu mett um og givið loyvi, um tað eftir umstøðunum var eyðsýnt óneyðugt og órímilig at halda fast við kravið.

Í aðra mátar hevur KF onki at viðmerkja.

Heilsan

Jóhan J. Lamhauge, løgfrøðiligur ráðgevi